# Føroyingar væl móttiknir í Letlandi



*Nøkur av føroyskum umboðunum, Jaenet Johannesen frá Atlanticon, Steinbjørn í Dali frá Menningarstovuni, Guðrun Olsen frá Syntesa og Áki Johansen frá Menningarstovuni her saman við Inarisj Voits, týðandi vinnulívsmanni í Riga*

**VINNUÁTAK**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sunnudagin kom eitt stórt føroyskt ferðalag til høvuðsstaðin í Letlandi, Riga. Talan er um 16 umboð fyri 10 føroyskar vinnu- og handilsfyritøkur, sum saman við Menningarstovuni eru farin til Estands og Letlands at kanna marknaðin har og møguleikarnar fyri samstarvi og samhandli.

Sosialurin skilur, at flestu luttakandi fyritøkurnar lata væl at. Ein serlig skrá er gjørd fyri hvørja einstaka fyritøku við áleið 4 fundum um dagin.

Nógv verður koyrt runt í Letlandi fyri at vitja fyritøkurnar og síggja teirra umstøður. Lettiska fiskivinnan er ikki so tekniskt framkomin sum tann føroyska, so góðir møguleikar eru fyri samstarvi frætta vit. Í gjár tosaðu nøkur av umboðunum við ein reiðara, sum varð sera fegin um Farrigaprojektið og væntaði sær gott samstarv við tey.

Mánadagin var eisini fundur við ein av fremstu vinnulívsmonnunum í Letlandi, Inarijs Voits. Hann er stjóri fyri lettiska fiskimannafelagið, stjóri fyri lettiska ráfiskaseljarafelagið, formaður í lettiska ráfiskaseljarafelagnum (framleiðarar), nevndarlimur í nevndini, sum býtir kvotur út og reiðari við 2 skipum, sum hava kvotu. At sami maður er oddamaður fyri bæði fiskimannafelagið og ráfiskaseljarafelagið er rættiliga áhugavert og eitt dømi um, hvussu lettiska samfelagið er sett saman. Hesi bæði fyrstu feløgini eru soleiðis skipað sambært lettiska lóg fyri at tey skulu tosa við einari rødd í Brussel.

Sum skilst verða føroyingarnir sera væl móttiknir í Letlandi.

Vert er m.a. at merkja sær, siga umboð fyri føroyska ferðalagið, at tá tað um korruptión viðvíkur, er Letland á einum 58. plássi (tað minst korrupta er nr. 1) á listanum yvir minst korruptu lond í heiminum. Estland er nr. 28, og tað eru tey stolt av. Skandinavisku londini liggja øll á top 10 fyri minstkorruptu lond í heiminum.

VINNUSÍÐURNAR



**Hvønn dag í Sosialinum, men serstakliga mikudagar**

Ta  er umráðandi og avgerandi at tit lesarar og viðskiftafólk okkara eru partur av vinnusí unum og senda okkum tilfar og tips til søgur, sum náttúrliga hoyra heima her. Sum snúgva seg um menniskju og um virksemi og arbeiði, um nútíð og framtíð. Ein annar partur av hesum tiltaki er at vinnuvirki og handilsfyritøkur taka av tilboðnum at lýsa við sínum vørum og tænastum.

Endamálið við VINNUSÍÐUNUM er at skapa áhuga fyri og menna vinnu, handverk og handil her heima og at vera við til at byggja brýr millum Føroyar og umheimin.

Her fara eisini vælskrivandi fólk innan vinnulívið, útbúgvingarverkið, granskingarumhvørvið og tað almenna og privata annars at bera fram hugsanir og sjónarmið, sum kunnu byggja upp undir eitt sunt og lívligt orðaskifti.

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

## Sølan øktist tá punktgjøldini hvurvu

Fyrsta mai í ár vóru punktgjøldini á nógvum vanligum el-lutum avtikin. Sambært handlunum er sølan økt munandi, og landið fær tí óivað líka nógva inntøku av vanliga sølu mvg'num

Eftir at vinnan í nógv ár hevur víst á, at punktgjøldini avlagaðu marknaðin, vóru avgjøldini á nógvum vanligum el-lutum avtikin fyrsta mai í ár, skrivar Vinnuhúsið.

Har hava tey spurt seg fyri hjá nøkrum av handlunum, sum selja hesar vørur, og ikki óvæntað er talan um eina sólskinssøgu. Nú punktgjaldið hvarv á lutum sum sjónvarpum og musikkanleggum er sølan vaksin munandi. Onkur av handlunum, sum hevur gjørt støðuna upp, hevur fyrstu 10 mánaðirnar í ár selt yvir 50% meir av hesum vørum enn um somu tíð í fjør. Sjálvt um ikki allir hava gjørt støðuna neyvt upp, verður tosað um ein stóran vøkstur í søluni. Handlarnir vænta eisini, at hetta serliga kemur at síggjast aftur í jólasøluni.

Grundin til at skiftandi landsstýri hava verið ivasom um at strika punktgjøldini, er tann inntøka tey góðu landinum. Men økta sølan merkir, at landið ríkiliga fær tað mista punktgjaldið inn í øktum meirvirðisgjaldið. Eisini liggur ein nógv størri partur av keypinum hjá føroyingum nú í Føroyum. Tað gevur vinning til føroyskar fyritøkur og merkir eisini, at handlarnir hava betur ráð til eitt stórt og dygdargott úrval.

- Stutt sagt eru øll vinnarar, bæði landskassin, handlarnir og brúkarin, staðfestir Vinnuhúsið.

- Hetta átti at fingið landsstýrismanninum í fíggjarmálum at taka punktgjøldini av á teimum vørum, sum enn eru darvaðar av punktgjaldi. Til dømis kann nevnast, at ljósamatur enn hava høga punktgjaldið. Hetta merkir, at føroyingar næstan alt árið eru inni undir kunstigum ljósi av vánaligari góðsku, tí dygdargóð ljósamaturir heilt einfalt eru ov dýr, heldur Vinnuhúsið.